


# **Johanna Thomina Joensen:** Sonurin gjørdist foreldraleysur 14 ára gamal

**Tað eru nógvar harðar lagnur í gamla kirkjugarði. Eitt dømi er Johanna Thomina Joensen, sum doyði á barsilssong. Maðurin Christian gekk burtur 14 ár seinni**

Óli Jacobsen

Johanna Thomina var fødd 18. september 1882 í Nólsoy. Foreldur hennara vóru Pauline Marie Nolsøe av Trappuni og Thomas Joensen Skylv.

Thomas var skipari. Hann førdi Bikuben í 15 ár (1872-87). Hon var merkt 32 tons, og tað var Jørgen Bech og Sønner í Klaksvík, sum átti hana. Thomas fiskaði við Bikuben bæði við Noreg, undir Íslandi og undir Føroyum. Thomas Skylv hevði gott ummæli sum sjómaður, og hann var avhildin av teimum, sum sigldu saman við honum.

Johanna Thomina giftist við Johan Christian Carl Joensen f. 12.6. 1876. Hann var úr Havn. Men tað gekk ikki væl hjá teimum. Hon doyði 24 ára gomul, 30.oktober 1906, tveir mánaðir eftir at hava fingið teirra fyrsta barn. Hetta var Cristian, vanliga kallaður Christian í Árnafirði (1906-1977). Árnafjørður var eitt hús úti á Reyni.

Tá ið Johanna Thomina var deyð, flutti Hansina, systir Christian, inn til teirra og helt hús. Frá um 1930 búðu tey í Tróndargøtu 3. Hansina var leiðari á vaskarínum hjá meiarínum í mong ár, og hon giftist ikki.






*Systrarnar hjá Christian, eldra: Maria, giftist í Danmark, Hansina, sum tók húsið hjá beiggjanum uppá seg, og Johanna, kona Johan Hendrik Rubeksen*





*Thomina Johanna og Christian Joensen. Bæði doyðu í bestu árum*



*Sonur teirra CHristian í Árnafirði*

## Var við til at bjarga skipi

Christian sigldi sum skipari. Í hvussu er var hann skipari á Oliviu undir Íslandi í 1910. Tað var eitt slíkt vánaligt veður, at skipini lógu bakk stóran part av túrinum. Men tað var so nógvur fiskur, at skipini gjørdu túr kortini.

Tað er ein søga í sambandi við Cristian. Systir hansara var gift við Johan Hendrik (Bill) Rubeksen. Eina ferð varnast teir, at ein skonnart var í havsneyð sunnanfyri Nólsoynna í heilt ringum veðri. Mastrarnar vóru brotnar, og skipið rak fyri vág og vind. Danska verjuskipið Beskytteren lá eystanfyri Nólsoynna og hætti sær ikki at fara til hjálpar, so ringt sum veðrið var.

Christian og Johan Hendrik mannaðu saman við Rubekki og Kristian Martin Rubeksen ein motorbát, og teir fara til hjálpar. Teir fingu fast á skonnartini og sleipa hana inn í Nólsoyarfjørð. Tá kemur Beskytteren og yvirtekur bjargingina fyri at fáa bjargingarlønina. Tað kom til sak um hetta, sum havnarmenninir vunnu. Tað varð eisini sagt, at skiparin á Beskytteren fekk sekkin, tí hann hevði greitt ósatt frá tí, sum hendi.

## Gekk burtur við Puritan

Men Christian gekk burtur við Puritan í 1920. Tað var Karl á Lag sum átti hetta skip. Skipið var nýtt, keypt í Svøríki í 1919, og tað hevði motor, sum ikki var ein sjálvfylgja tá á døgum.

Skipið var farið úr Havn til Fleetwood við eini last av saltfiski. Tað hevði eina langa ferð, hon tók ikki minni enn 3 vikur. Á ferðini heim er tað gingið burtur í einum ódnarveðri.

Tað vóru tveir menn bjargaðir, motorpassarin Sofus Joensen og ein ferðamaður "landsfogedfuldmægtig" Hans Jacobsen.

Um teir, sum fórust, skrivaði Dimmalætting:

Skibet førtes af **Kapt. H.P. Olsen** [Palli á Lava], 38 aar og **Kapt. Chr. Joensen** [Kristian í Árnafirði], 44 Aar var med som Bedstemand. De to er af vores allerdueligste Sømænd og driftigste Fiskeskippere, der her er gaaet bort. H.P. Olsens 17 aarige Søn, **Jacob Olsen**, var med paa Turen, det var hans første Tur til Søs, og han er omkommet sammen med Faderen. En ung rask Thorshavner, **Peter Guttesen**, 29 Aar, og to raske Fiskere fra Nolsø, **Ole Hansen**, 29 Aar, og **Hans P. Danielsen**, 26 Aar, er ligeledes forulykket.

## Verfaðirin fórst eisini á sjónum

Sonurin Christian, sum nú gjørdist foreldraleysur 14 ára gamal, giftist í 1950 við Petru Mariu Lindberg (1917-2003) av Tvøroyri. Tey fingu tvey børn, Káru f. 1951 og Hans Petur f. 1953. So merkiligt var tað, at Petra Maria misti eisini pápan á sjónum í 1920. Hann kallaðist Petur Hansen Lindberg, og hann gekk burtur við "Karin" undir Íslandi. Petra Maria var einasta barn, og hon var bert 3 ára gomul, tá ið hon misti pápan.

Christian lærdi til snikkara hjá Hartvig Hansen og var síðan í timburlæru hjá Frits í Pæsastovu. Hann arbeiddi eisini hjá Hans Hilmar Dam. Hann var millum annað við til at gera molan í Havn og at smíða sjónleikarhúsið.

Christian innrættaði sær eisini snikkaraverkstað heima í Tróndargøtu, har hann uttan maskinur gjørdi møblar, vindeygu og hurðar.

Hann var eisini ítróttarmaður og róði kapp sum ungur, var eisini við til at vinna á ólavsøku. Sum nógvir havnarmenn róði hann eisini út og var traðarmaður. Hann hevði kolonihava á Ternuryggi. Har plantaða hann trø, og er hansara øki millum tey størstu privatplantaðu økini við trøum í Havn.

## Systkin

Tað er ikki nógv, sum kann sigast um Johanna Thominu, so stutt hennara lív gjørdist. Men hon átti systrar, sum blivu kendar. Tær vóru:

**Ellen Marie Joensen** (1868-1951), giftist við Jógvan Jacobsen, Bøkjarin (1862-1946).

**Anne Cathrine Joensen** (1872.1954). Giftist við Christian Edvard Djurhuus, beiggi millum onnur Janus og Hans Andreas. Christian Edvard rak Hotel Djurhuus frá 1908 eftir pápabeiggjan, Dia á Vertshúsinum, men hann doyði longu í 1916. Tá tók konan við, og hon rakt hotellið í mong ár. Tey hava verið umrødd í hesi røð.

**Johanne Marie Skylv Joensen** (1877-1974), giftist í 1897 við Anders Hansen úr Danmark.

Í 1902 fluttu tey til Keypmannahavnar, har mangur føroyingur kom á gátt og kendi seg sum í einum friðskjóli í høvuðsstaðnum. Ì 1912 fekk Anders starv vit vitan á Akrabergi, har hann starvaðist til 1917.

Síðani vóru tey á Borðuna til 1924, tá hann gjørdist vitameistari í Mykinesi. Í 1931 var Anders fluttur aftur á Borðuna sum vitameistari, til Anders legði frá sær vegna aldur, og tey fluttu í barndómsheimi Skylvsborg í Nólsoy at búgva. Í 1952 fluttu hjúnini til Havnar. Í hjúnabandinum vóru 8 børn.

Tað var í tíðini á Mykineshólmi, at Johanna Maria fór at skriva og yrkja. Nakað sum hevur sermerkt hennara ætt.

Eftir at børnini vóru undankomin fekk Johanne Maria betri stundir til at savna seg um síni áhugamál: at lesa og festa á blað frásagnir frá lívsháttinum í hennara barna- og ungdómsárum. Hennara avrik varð til bókaverkið Gamlar Gøtur, ið telur fýra bind.

Kelda:
Egon Hansen
Hans Petur Joensen
Hendrik Rubeksen

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt frá Siggu og Georg Joensen, sum mistu øll teirra trý børn eftir trimum árum.